## DAGSINS MEINING

# Samgongutrupulleikar

Neyvan nakrantíð í Føroya søgu er ein so ósamd, so smøl og so “eitrað” samgonga farin til arbeiðis sum henda, og neyvan nakrantíð hevur so grundleggjandi og hatskt stríð tikið seg upp millum tveir oddaflokkar í samgongu so stutt eftir, at hon varð skipað sum hesaferð.

Hetta vistu øll, sum bara hava fylgt eitt sindur við. Hetta vistu løgmaður og varaløgmaður. Kortini skrivaðu teir undir eina samgonguavtalu, sum teir framman undan vistu fór at vera ring at halda, tí flokkarnir eitt nú á vinnupolitiska økinum eru so ósamdir. Hóast stevið hevur verið vánaligt í seinnu helvt av undanfarna samgonguskeiði, vóru teir á bylgjulongd nakað fram á leiðini, tá tað galt fullveldismál. Nú tá hesi eru løgd innaliga í eina skuffu koma konfrontatiónirnar, tí tjóðveldismenn sum vera mann eru ikki altíð samdir í tí vinnupolitikki, sum fólkafloksmenn vilja reka og øvugt.

Tað eru øgiligar ábreiðslur og skuldsetingar, sum vinnupolitiski talsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, setir fram móti sínum samgongufeløgum úr Fólkaflokkinum. Hann fer so langt sum at illgita teir fyri at hava verið á tí skeivu síðuni av lógini, nakað, sum eingin við virðing fyri sær sjálvum og sínum embæti eigur at kunna liva við. Løgmaður sigur, at hesin orðini sleppa ikki at standa ósvarað.

Ófatiligt er tað, at løgmaður ikki legði frá sær eftir valið ella gjørdi meira fyri at fáa stóru andstøðuflokkarnar ella annan teirra við í samgonguna, tá hann alla tíðina hevur vitað, hvønn veg tað fór at bera í samgongusamstarvi við ein Tjóðveldisflokk, sum eftir valið varð drenaður fyri hóvligar kreftir, og har tann “harða” kjarnan við Tobba, Høgna og Páll einsamøll fekk fullkomið vald í flokkinum. Hann visti, at Føroya land hevði tørv á at byggja uppaftur álit innanhýsis og við Danmark, og hetta fór ongantíð at verða gjørt við hesi hørðu kjarnu í Tjóðveldisflokkinum sitandi á flestu á landsstýrissessunum. Hann visti, at Tórbjørn Jacobsen hevur ikki gloymt honum reyða kortið frá undanfarna skeiði. Hann visti og veit tað enn, at ein samgonga við Tobba sum 17. manni er sum sjálvboðin alt lívið at ganga í einum minufelti. Tí átti hann heldur at lagt frá sær enn at farið inn í ta smølu og framman undan amputeraðu samgonguna við Tjóðveldisflokkin – ella átti hann at sett sum krav fyri at fara í samgongu aftur við ein Tjóðveldisflokk uttan Signar og Finnboga, at Javnaðarflokkurin var við. Tað gjørdi løgmaður ikki, og tí kann við røttum nú sigast: “Ró nú Snoprikkur – ró nú Anfinnur”.

Føroya løgmaður kann ikki liva við teimum skuldsetingum, sum ein av hansara egnu samgongufeløgum hevur sett á prent. Hann er noyddur til at krevja av Tjóðveldisflokkinum, at hann tekur avstand frá hesi skuldseting, og hann er noyddur til at krevja eina treytaleysa umbering frá Tórbirni Jacobsen. Kemur hesin ikki við slíkari verður løgmaður noyddur til at slíta alt samstarv við mannin, og tað merkir í veruleikanum, at hann má uppleysa samgonguna, sum tá ikki hevur meiriluta aftanfyri seg longur. Letur hann standa til og tegir, góðtekur hann eisini skuldsetingarnar. Tað kann hann ikki loyva sær yvirfyri Føroya fólki. Okkara niðurstøða eftir hesa skriving er tann, at grundarlag er ikki undir hesi samgongu meira. Antin verður nýggj samgonga skipað ella fáa vit eitt nýval. Forpestaða luftin má reinsast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kirkjufólk skulu eisini spyrjast

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokurin*



Tíbetur er fráboðaða yvirtøkan av føroysku fólkakirkjuni aftur vorðin aktuelt evni í fjølmiðlunum, tí ódemokratiska viðgerð landstýrisins higartil kann als ikki góðtakast. Spurningar, ið snúgva seg um okkara fólkakirkju, eru sera eymt kjakevni í Føroyum, og tað eiga vit at virða.

Rættiliga harðligt orðaskifti tók seg upp í 1997, tá politisk ósemja gjørdist um kirkjulógaruppskotini, ið S.P. í Grund sum landsstýrismaður við mentamálum tá legði fyri løgtingið. Uppskotini vóru ríkislógartilmæli, sum føroyska embætisverkið hevði arbeitt við í fleiri ár, og sum stórur tørvur var á, tí so nógvir ógreiðir spurningar vóru.

Arbeitt var í Føroyum við lógum, sum vóru frá 1924, og sum stórliga høvdu tørv á dagføringum.

Viðgerðin av tilmælunum endaði við, at løgtingsmaðurin Signar á Brúnni úr Tjóðveldisflokkinum í staðin valdi at leggja fram uppskot um yvirtøku av fólkakirkjuni.

Uppskotið um yvirtøkuna varð felt ta ferðina, meðan uppskotini um broytingar í kirkjulógunum vóru samtykt.

**Landstýrismaðurin**
Seinri gjørdist Signar á Brúnni sjálvur landstýrismaður við mentamálum, og í tí starvinum royndi hann alt fyri at sleppa undan at avgreiða málið um dagføring av kirkjulógunum. Hetta var orsøk til nógv rok og rumbul bæði í landsstýrinum og í fjølmiðlunum, tí tá løgtingið hevur avgreitt eitt mál, skal landsstýrismaðurin akta løgtingið!

Føroya bispur eins og Prestafelagið vístu m.a. í fjølmiðlunum á, hvussu neyðugt var at fáa broytingarnar í kirkjulógunum lýstar, og dentur var eisini lagdur á, at hesar lógir vóru ongin forðing fyri seinri yvirtøku av fólkakirkjuni.

Men tað legði landsstýrismaðurin lítið í, hóast eisini løgmaður (sami sum situr í dag) fleiri ferðir í fjølmiðlunum boðaði frá, at nú varð málið loyst, tí tað hevði hann givið boð um.

Landstýrismaðurin svaraði og bað m.a. løgmann um at halda seg burturi frá tí, hann ikki hevði innlit í, við øðrum orðum: onki skil hevði fyri ! Og tá landsstýrismaðurin setti nevnd at fyrireika yvirtøku av fólkakirkjuni, vóru bæði Prestafelagið og bispur hildnir uttanfyri alla ávirkan.

Hesum hava bæði politikarar og onnur mótmælt, men onki hjálpti.

Á heysti 2001 var nevndin liðug við álitið, ið varð handað landstýrismanninum, men politikarar sluppu ikki at viðgera álitið, sjálvt um biðið var um tað frá tingsins røðarapalli fleiri ferðir.

Eisini gekk striltið hjá løgtingslimum yvirhøvur at fáa eintak av álitinum.

At landstýrismenn við mentamálum (allir úr Tjóðveldisflokkinum) hava havt stutta politiska livitíð hesi árini, hevur heldur ikki víst seg at gjørt málið lættari.

**Støðan í dag.**
Í dag er støðan tann sama. Kirkjumyndugleikarnir eru ikki tiknir við í arbeiðið, og samráðingarnar um yvirtøkuna halda fram eftir sama leisti sum áður, hóast samgonguskjalið nú er orðað soleiðis, at kirkjan og kirkjumyndugleikarnir skulu takast við.

Álitið hevur fleiri tilráðingar, sum kunnu enda við, at vit fáa eina fríkirkju í staðin fyri eina føroyska fólkakirkju, soleiðis sum eisini bispur vísir á, og ikki minst av tí orsøk eigur kirkjufólkið eisini at takast við í endaligu avgerðina.

At løgmaður nú samb. fjølmiðlunum hevur givið leiðandi embætismanninum eina ábreiðslu ella harraboð gevur ikki bestu vónirnar um broyting, tí eftirhondini hevur løgmaður sagt so nógv, sum ikki heldur. Og hví er tað nú bara embætismaðurin og ikki landstýrismaðurin, sum fær ábreiðslur ella boð?

Er tað ikki løgmaður, sum skal ansa eftir, at landstýrismenn útinna sítt starv "á fullgóðan hátt" ?

Løgmaður hevur jú latið fleiri av sínum arbeiðsuppgávum til aðrar landsstýrismenn at røkja, so nú skuldi hann havt tíð at tikið sær av tí, sum eftir er av hansara.

Skal fólkakirkjan yvirtakast, og tað eru tey flestu samd um, skal alt vera væl fyrireikað, og vit skulu vita, hvat vit yvirtaka og hvussu fram skal farast. So er líkamikið hvussu nýggja landstýriskvinnan, sum hevur arvað málið, roynir at burturforklára.

Eina so ódemokratiska viðferð sum vit higartil hava sæð, er føroyingum til lítlan sóma.

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.





*Ferðamannaskipið A ’Rosa Blu kom á Havnina gjáramorgunin. Smyril líkist næstan einum útróðrarbáti afturímóti*

# A´Rosa Blu – 7. himmal á havinum

**Stóra og glæsiliga ferðamannaskipið, A´Rosa Blu, kom á Havnina í gjáramorgunin við 1350 ferðafólkum. Skipið hevur alt ein kann ynskja sær. Alt frá massagu til skúlatímar**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein Myndir: Jens Kr. Vang*

Tá vit koma umborð á ferðamannaskipið, A´Rosa Blu, fáa vit at vita, at vit sleppa ikki umborð, tí gestir eru ikki loyvdir. So er ikki annað at gera enn at fara til teir hægri myndugleikarnar – Skipafelagið.

Á Skipafelagnum eru tey blíð og týð, sjálvt um har er ein rúgva at gera, nú skipið hevur lagt at. Ein rúgva skal fáast í rætt lag, og telefonin ringir næstan óavbrotið.

Men trý korter seinni fylgir Árni Dam okkum yvir á ferðamannaskipið, og eina telefonsamtalu seinni eru vit umborð.

### 10 havnir, 14 dagar

Yvirhovmeistarin, Michael Wendt, bjóðar okkum vælkomin, og vit fara á 14. hædd á skipinum. Vit sleppa at síggja alt, sum er umborð.

– Hendan ferðin umfatar 10 havnir í 14 dagar. Vit byrjaðu í Týsklandi, og hava higartil verið í Noregi og í Íslandi. Tá vit fara úr Havnini í dag klokkan 16, gongur leiðin til Skotlands og síðani aftur til Týsklands, greiðir Michael Wendt frá.

Hetta er tó ikki størsta ferðamannaskipið, sum hevur lagt at í Havnini. Eitt er, sum hevur verið størri.

Leiðin gongur fyrst inn í fitness-rúmið. Har eru kondisúkklur og rennibreytir, og tú kanst eisini fáa massagu og andlits-, húð- og kropsviðgerðir. Vit fara niður trappurnar, og har eru nógvar ymsar hurðar, og aftanfyri tær goymir nógv spennandi seg.

– Her er tað sokallaða fostur-rúmið, sigur yvirhovmeistarin og letur eina hurð upp.

– Tá tú fer inn hagar, kennist tað, sum tú ert inni í búkinum á mammu tíni. Hatta er eitt slag av heilareinsan.

Hinar hurðarnar bjóða Kräuterbad, sauna, brúsubað og nógv annað spennandi.

Nú eru vit uttanfyri á sóldekkinum. Ein stórur svimjihylur er í miðjuni umgyrdur av sólstólum. Og fyri endan er ein barr.

### 7 matstovur

Inni aftur í skipinum fara vit inn í eina matstovu. Hetta er ein sokallað California Grill, sum hevur opið 24 tímar um døgnið. Alt í alt eru sjey matstovur umborð, so ferðafólkini kunnu fáa júst tað teimum lystir.

– Skipið er 12 ára gamalt, og er nýliga gjørt ístand. Alt er gjørt av nýggjum uppá seks vikur, fortelur Michael Wendt.

– Vit hava 800 kabinur og pláss er tilsamans fyri 1600 ferðandi.

Eitt sindur longri aftur á sjeynda dekki liggur teatri. Har inni venja tey til showið, sum verður í kvøld. Hvørt kvøld er eitthvørt á skránni, og pláss er fyri 600 áskoðarum.

– Teatrið er hóast alt ov lítið til hetta skipið. Tá pláss er fyri 1600 ferðandi, er ikki nóg mikið við bert 600 plássum.

Men ikki tí. Nógv annað er, sum tey ferðandi kunnu taka sær til. Nú eru vit komin inn í biografin. Har er ein stórskíggi, og yvirhovmeistarin fortelur okkum, at í kvøld verður eitt Star Wars kvøld, har tey fara at vísa Star Wars filmar til klokkan fimm á morgni.

### Mini-SMS

Sjeynda dekk er høvuðsdekki. Har liggja tær flestu og vakrastu matstovurnar, teatrið, biografurin og sølubúðirnar.

Sølubúðirnar eru nógvar og glæsiligar. Tú kanst keypa alt tær lystir. Klæðir, hálsprýði, góðgæti, mat... ja, listin er óendaligur. Eisini eru tær so nógvar, og á tveimum hæddum, so hetta tykist næstan sum eitt lítið SMS.

Runt á øllum skipinum ganga fólk og vaska og rudda alla somlu tíðina. Ikki ein skitin blettur er at síggja nakrastaðni, so reingerðin er í topp.

– Fólkini skulu ikki keða seg umborð, tí hava vit nógv tilboð til teirra. Til dømis, umframt allar barrirnar, náttklubbarnar, matstovurnar og fitness-sentrið, bjóða vit eisini teimum ferðandi at læra enskt betri. Eisini ber til hjá teimum at taka dansi-tímar umborð, sigur Michael Wendt.

A´Rosa Blu fór avstað aftur Havnini í gjár klokkan umleið 16, men verður aftur um eini 14 dagar.

Stóra og glæsiliga ferðamannaskipið er heimahoyrandi í London. Tað vigar 70285 t brutto. Reiðaríið er Seetours. Longdin á skipinum er 245 metrar og tað stingur 8,5 metrar niður frá vatnskorpuni.

Manningin telur tilsamans 565 fólk, sum eru frá 23 londum.



*Umborð á stóra og glæsiliga ferðamannaskipinum er millum annað ein lítil sølumiðstøð …*



*… sóldekk við svimjihyli og barr …*



*… og fitness-sentur – umframt sjey matstovur, biografur, teatur og nógv annað*